# ÁRSINS VITANARFRÓÐU

KAPPING 2019/20

## HVAT ERU LITIR, OG SÍGGJA ØLL SOMU LITIR?



# Granskarar: 7. Flokkur í Skúlanum á Argjahamri.

## INNGANGUR

Vit eru ein bólkur í 7. Flokki í Skúlanum á Argjahamri, vit hava valt at arbeiða við litum og farvublindni/blindni. Vit halda hetta verða eitt sera áhugavert evni.

**Lærari:**

Mariann Súsanna Poulsen og Katrine Kjeld

**Luttakarar:**

Annika, Bára, Sanna, Silja, Kristina, Ári, Heini, Teresa, Boas og Marjun.

Vit loyva, at frágreiðingin verður løgd á gransking.fo, og
at tilfar úr henni kann verða nýtt til marknaðarføring.

# INNIHALD

2. Hví er tað so?

3. Legg eina ætlan

4. Savna upplýsingar

5. Hetta eru vit komin fram til

6. Sig øðrum frá

Fylgiskjøl

# 1. HETTA UNDRAST VIT Á

Vit undrast á: *Hvat eru litir, og síggja øll somu litir?*




# 2. HVÍ ER TAÐ SO?

Okkara hypotesur:

1. Nøkur fólk síggja sterkari litir enn onnur.
2. Børn síggja ikki somu litir sum vaksin.
3. Blind fólk síggja litir.
4. Litir broytast í ljósið og myrkri.

# 3. LEGG EINA ÆTLAN

Vit fara at gera nakrar kanningar fyri at fáa svar uppá okkara spurning, og hypotesur.

Samrøðu við ein optikara.

Samrøðu við blindastovnin.

Spyrja fólk hvørjir litir tey síggja, og vita um børn síggja tað sama sum vaksin.

Kannað um litirnir í einum rúmið broytast, um man sløkkir ljósið.

# 4. SAVNA UPPLÝSINGAR

Vit síggja umleið 1000 * 100* 100 litir.
Heilin og eyga samarbeiða og fáa ljósið til at verða litir. Eyga sendir signal til heilan at hann skal umseta hvat eyga sær. Vanliga er alt hvítt og svart.
Stavur = Tá ið man skal síggja myrkri.
Strýta= tað sum ger at man sær litir. Har eru reytt, grønt og blátt.
Farvublind fólk hava ikki allar strýtir, og tað er tí at teirra sjón er soleiðis. Tey sum hava reytt og grønt farvublindni mangla teirra reyðu ella grønu strýti.
Ístaðin fyri at hava 3 strýtir hava tey bara 2 sum rigga ordiligt.
Tey sum hava bláa og gula farvublindni mangla teirra bláa strýti, tey hava ringt við at síggja mun á bláðum og gulum.

**1.**

Vit hava gjørt eitt spurnarblað, og vit spurdu børn í 0., 4., 5. og 6. flokki hvønn lit tey sóu á pappírinum. Vit spurdu eisini lærararnir í skúlanum, og vaksin fólk í SMS hvønn lit tey sóu. Vit funnu útav at nøkur børn síggja sterkari litir enn vaksin.

**Sí fylgiskjal 1.**



**2.**

Vit vitjaðu sjónardepilin, og spurdu eina blinda konu nakrir spurningar viðvíkjandi blindni.

**Teir litirnir, sum tú sást tá minist tú enn teir í høvdinum?** Ja tað geri eg. Eg gangi høgt uppí litir. Litir á klæðum og heima hjá mær.

**Um tú ert í einum rúmi, har tað er bøla myrkt, sært tú um tað er myrkt ella ljóst?** Tað er eitt sindur ymiskt onkuntíð haldi eg at tað ljóst, men tað er myrkt.

**Um onkur sigur at ein reyð troyggja liggur á borðinum, veitst tú so hvat reytt er?** Also eg veit gott hvat reytt er. Men reytt kann jú vera so nógv.

**Hvønn lit sært tú beint nú**? Grátt.

**Eru hinir sansirnir blívnir sterkari eftir at tú ert blívin blind**? Teir eru ikki blívinir betri, men teir eru bara vaknaðir.




Vit fóru eisini til ein optikara og spurdu hana eitt sindur um litir og farvublindni. Vit spurdu:

> **Eru tað ávísir litir farvublind  fólk síggja?** Tey síggja ofta nakrir ávísir litir, men kanska mótsettningar í litum sum tey ikki síggja.  Tað er ofta reytt og grønt, tí at tað er rættiliga brúnligt. Og blátt og gult. Men tað eru ikki allir litir sum ávirka farvublindni.
>
> **Hví síggja menniskjur ikki bara svart og hvítt?** Tað er tí at vit hava brúk fyri at síggja litir, tí at so síggja vit tildømis á mati um hann er for gamal ella ikki, og tað er umráðandi at síggja hvør litur tað er á ljóskurvum.
>
> **Hvat er ein litur?** Litir koma frá farvubylgjum. Og grundin til at vit hava fleiri sløg av litum er at man hevur ymiskar longdir av farvubylgjum.

**4.**

Vit gjørdu nakrar royndir við at taka myndir í einum rúmið tá tað er ljóst, og tá tað er myrkt.

Myndirnar broyttust rættiliga nógv tí fyri at litir skulu koma, hevur man brúk fyri ljósið.

**Sí fylgiskjal 2.**

**5.**

Vit hava lisið um litir og uppbygnaðin í eyganum.

# 5. HETTA ERU VIT KOMIN FRAM TIL

Vit eru komin fram til, at øll síggja ikki tað sama, ella teir somu litirnir. Litir koma frá farvubylgjum og sólini. Grundin til at vit síggja litir er tí vit hava sokallaðir tappar og stavar í eyganum. Tapparnir uppfanga litir, og stavarnir uppfanga grátónar. Vit eru eisini komin fram til nógv børn síggja teir somu litirnir, og tey flestu vaksnu síggja teir somu litirnir. Vit funnu eisini útav at blind fólk síggja litir fyri sær í høvdinum.

# 6. SIG ØÐRUM FRÁ.

Vit hava koyrt tað á gransking.fo.

# FYLGISKJØL

Keldulisti:

Optikari í skilling

Rutt í sjónardeplinum.

Eitt video á Youtube.

https://www.youtube.com/watch?v=DJDBTNbAWOE á hesum linkinum hava vit fingid at vita hvussu litir virka, og hvussu farvublindni er og hvat tað er.

Tú kanst hyggja á skilling.fo at síggja hvar vit hava verið og spurt ein optikara.

Hvønn lit sært tú her?



Set x

- ❑ Lillaður
- ❑ Ljósareyður/pink

Um tú sært annað skriva her:

Hvønn lit sært tú her?



Set x

- ❑ Blátt og svart
- ❑ Blátt og gull/brúnt
- ❑ Gull og hvítt

Um tú sært annað skriva her:

.

2.


Kjólin
1
19
61
39
Blátt og svart
Blátt og gult
Hvítt og gult
Lilla og svart


Skógvurin
10
26
86
Lilla
Ljósareytt
Bæði

2.



